Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Nr. 65/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur settur Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismanni í almannamálum, viðvíkjandi fólki undir 67 ár við serligum tørvi (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

1 Hvussu ber tað til, at suðuroyingar, sum hava tørv á plássi, noyðast av oynni, um teir skulu hava møguleika at koma á stovn fyri fólk við serligum tørvi, meðan onnur verða send suður?
2 Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at útvega fleiri búpláss í Suðuroy til føroyingar undir 67 ár við serligum tørvi?
3 Hví hava vit ikki Dugna í Suðuroy?

Viðmerkingar:

Í Suðuroy er bert ein stovnur við búplássum fyri føroyingar við serligum tørvi, sum eru undir 67, meðan tað eru fleiri í Streymoy, Norðoyggjum og Vágum.

Tey fáu plássini í Suðuroy eru øll upptikin, ikki einans av suðuroyingum, men eisini av fólki, sum ikki hava nakað tilknýti til Suðuroynna. Suðuroyingar eru tískil noyddir av oynni fyri at leita sær hjálp og møguligt búpláss.

Herfyri var frammi, at Dugni eisini letur upp í Klaksvík. Tað legst afturat Dugna í Tórshavn og Dugna á Kambsdali. Tað er eitt kærkomið tilboð, sum er til mikið gagns fyri nógvar føroyingar.

Tað hevði hjálpt munandi um hjá hesum fáu, sum hava brúk fyri einum innihaldsríkum gerandisdegi. Okkurt at fara upp til og okkurt til at takast við í einum vardum starvi. Tí hevði Dugni verið eitt kærkomið tilboð í Suðuroy.

Tað eru eisini føroyingar í Suðuroy, sum hava átrokandi brúk fyri hjálp í nærumhvørvinum, bæði fyri vardum størvum og búfelagsskapum. Hetta rakar bæði tey, sum hava tørv á hjálp, og ikki minni tey avvarðandi. Tey avvarðandi møta einum múri av vónloysi og undarførslum, tá tey ferð aftaná ferð fáa sama svar um manglandi vard størv í Suðuroy; um at tað eru ov fá búpláss í landinum, og av tí verða plássini latin øðrum, sum ikki hava nakað tilknýti til oynna, ístaðin fyri til tey staðbundnu.

Suðuroy er enn í eini serstøðu, so leingi tað ikki er landfast til restina av Føroyum. Tí er spurningurin, um tað ikki eigur at vera møguligt at leggja tað soleiðis til rættis at veita neyðugu hjálpina í nærumhvørvinum og ikki tvinga fólk av oynni. Í flestu førum mugu tey eisini siga farvæl til alt tað kenda - tey avvarðandi og gerandisdagin. Tí rakar tað nógv harðari og nógv fleiri enn neyðugt.

Tá avvarðandi venda sær til Almannaverkið, hava tey aloftast sjálvi troytt allar møguleikar at hjálpa sínum kæru. Tað er ikki fyrr enn, tá ið tey ongan annan útveg síggja, at tey leita sær hjálp. Tí er tað sera harmiligt, at vónloysið hjá teimum avvarðandi sær út til at vaksa, tá tað almenna kemur inn í myndina. Spurningurin er, hvar vit eru á veg, um vit ikki hjálpa teimum veikastu fyrst. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 11. mars 2020

Bjarni Hammer